# TÁ ARBEIÐSPLÁSSIÐ VERÐUR **HIMMIRÍKI**



**CORPORATE RELIGION** EITUR EITT **HUGTAK**, SUM LÝSIR, HVUSSU SUMMI **ARBEIÐSPLÁSS** VERÐA SUM **RØRSLUR**, HAR FYRITØKAN SJÁLV ER **HIMMIRÍKI**, OG STJÓRIN ER **GUÐ**. Í TÍLÍKUM **FYRITØKUM** SETIR ONGIN **SPURNARTEKN** VIÐ LEIÐINA, IÐ FYRITØKAN FER. ØLL **HÁLOVA** FYRITØKUNI, GERAST **PARTAEIGARAR** Í HENNI OG BOÐA **GLEÐIBOÐSKAPIN** UM HENNARA **DUGNASEMI**. SO MIKIÐ STØRRI VERÐUR **SKELKURIN**, TÁ FYRITØKAN FER Á **HÚSAGANG**, OG HIMMIRÍKI VÍSTI SEG AT VERA EIN DREYMASJÓN. **EIK** VAR EIN TANN FYRSTA **FØROYSKA** FYRITØKAN AV TÍLÍKUM **SLAG**



**ARBEIÐSPLÁSS**

**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Átrúnaður hevur allar dagar havt alstóran týdning fyri menniskju, og tí finnast eisini óteljandi sløg av átrúnaði kring heimin. Felags fyri allar trúarrætningar er trúgvin á okkurt, sum er hægri. Undan upplýsingartíðini hevði átrúnaður sera stórt vald, og tann, sum vildi svara heimsins loyndarmálum við vanligum vísdómi, skuldi ansa sær at kunngera sínar tankar, tí hann kundi verða brendur á báli. Eftir upplýsingartíðina bragdaði kortini, og vísindin vann seg fram. Sjálvstøðugt hugsandi menniskju fóru at loysa manga gátuna við viti og skili, og mentanarliga, ídnaðarliga og politiskt skapti hetta stór framstig. Átrúnaðurin hvarv ikki av hesi orsøk. Hann misti bara sítt altumfevnandi vald á samfelagnum, tí fólk sóu, at við vitan kundi skapast framburður.

Øll, sum vilja hava vald á øðrum menniskjum, royna at skapa eina kenslu av felagsskapi, har tey sjálv standa á odda fyri felagsskapinum. Í sunnum felagsskapum verður valdið ásett við demokratiskum mannagongdum, og leiðararnir eru ikki óuppnáiligir gudar, ið ongin kann seta spurnartekn við. Tosast kann við teir, og funnist kann verða at teirra avgerðum. Men soleiðis er langt frá altíð í handilsligum fyritøkum. Í fyritøkum hava stjórarnir stórt vald á starvsfólkunum, serliga tí teir gjalda starvsfólkunum løn, men eisini tí fyritøkur sjáldan verða stýrdar serliga demokratiskt. Har ræður stjórin, og um hann ikki er opin og vil hava mótspæl fyri at menna seg og fyritøkuna, tora starvsfólk sjáldan at siga sína veruligu hugsan um, hvat fyriferst í fyritøkuni.

> ***Í eini fyritøku, ið verður rikin sum ein samkoma, er stórur vandi fyri, at kritiski sansurin hjá starvsfólkunum hvørvur, og at vit og skil verða løgd til viks***

## Halleluja, eg arbeiði!

Seinnu árini hevur tikið seg upp ein leiðsluháttur, ið blandar saman bæði demokratiskan, einaræðisligan og átrúnaðarligan leiðslustíl. *Corporate religion* nevnist hesin leiðsluháttur. Hann snýr seg í stuttum um at geva fólki fatan av, at tey hava ávirkan og verða viðfarin sera menniskjaliga, men samstundis verða tey skúlað til at halda, at einasta rætta arbeiðsplássið á jørð er teirra egna. Starvsfólkini verða sum ein rørsla, ið boðar gleðiboðskapin um arbeiðsplássið, og stjóran skal ongin makt í verðini seta spurnartekn við, tí hann er tann, sum gevur starvsfólkunum frukt, kondirúm, gávur, jakkar og flottar starvsfólkaveitslur. Hugsanin handan corporate religion er, at arbeiðsplássið skal gerast himmiríki hjá starvsfólkunum, so tey lættari fáast at ganga aftan á leiðsluni.

Á tílíkum arbeiðsplássum er ymiskt, hvussu starvsfólk uppføra seg, tí fólk eru jú ymisk. Summi eru persónliga sterk og hugsa altíð sjálvstøðugt, sama um tey hava ein arbeiðsgevara uppi yvir sær ella ikki. Onnur eru persónliga veikari og gera, sum stjóri og deildarleiðarar siga. Um arbeiðsplássið gongur eina leið, ið tykist óforsvarlig, muta tey sterkastu kanska ímóti, um tey annars ikki hava so nógvar fyrimunir, at tey tiga. Tey veikastu siga onki. Tey eru kanska so veik, at tey langt síðan hava lagt allan sín samleika í fyritøkuna. Teirra vælvera er treytað av heilsupolitikkinum hjá fyritøkuni. Teirra gleði stendur og fellur við tiltøkum, sum fyritøkan skipar fyri. Og teirra stoltleiki er treytaður av, hvussu væl stjórin stendur seg í fjølmiðlunum.

## Sum í eini samkomu

Í eini fyritøku, ið verður rikin sum ein samkoma, er sostatt stórur vandi fyri, at kritiski sansurin hjá starvsfólkunum hvørvur, og at vit og skil verða løgd til viks. Um leiðslan sigur, at nú hevði verið skilagott hjá starvsfólkunum at keypt partabrøv í fyritøkuni, ja, so er tað skilagott, og starvsfólkini keypa partabrøv í fyritøkuni. Ongin vil jú vera illoyalur ímóti himmiríki. Um arbeiðsplássið so er ein banki, ið kann veita starvsfólkunum lán at keypa partabrøvini fyri, er tað jú uppaftur betri, tí hevur tú lænt frá egnari fyritøku fyri at keypa partabrøv í egnari fyritøku, kanst tú ómøguliga koma illa fyr. Tú kennir jú øll har, leiðslan eggjar tær at gerast partaeigari, og øll hini gerast eisini partaeigarar, so sjálvandi bert tú teg rætt at.

Meðan stjórin stendur seg væl í fjøl-